# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Teir stríddust í eina viku, men eftir kappingina kundu telvararnir sjávlandi eisini smílast hvør til annan*

# Sulskis og sviar vunnu

**Forkunnuga talvkappingin, Klaksvík International, er av á hesum sinni. Stórmeistarakappingin, sum er sterkasta kapping, sum telvað er í Føroyum nakrantíð, borðreiddi við spenningi, áhugaverdum talvum – beinleiðis um alnetið – upp- og niðurtúrum, men ikki minst áræði til, at enn fleiri kappingar av slíkum slag verða í Føroyum**

TALV
*Jógvan Joensen*
*jogvan@kallnet.fo*

Farnu vikuna vóru níggju telvarar savnaðir til GM-kappingina Klaksvík International 2008. Serliga høvið var, at Klaksvíkar Kommuna í ár fylti 100 ár, og varð hetta markerað við lít í einum av sigursvandu talvøkjunum í landinum: fýra stórmeistarar, tveir altjóðameistarar, tveir fidemeistarar, harav Heini Olsen, umframt Martin Poulsen og Olaf Berg úr Føroyum, telvaðu "allir-móti-øllum" í Klaksvík.

Talan gjørdist um eina sera stóra avbjóðing hjá føroysku umboðunum, sum vóru seedaðir aftast í sterka feltinum. Hinvegin gav sterka mótstøðan rímiligar møguleikar fyri at vinna IM-normar, tí kravið til vunnin stig, gjørdist tilsvarandi minni.

**Endaliga støðan**

| | | Telvari | Tjóð | Rating | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GM | Sarunas Sulskis | LTU | 2572 | 6,5 |
| 2 | IM | Esben Lund | DEN | 2425 | 5,5 |
| 2 | IM | Tapani Sammalvuo | FIN | 2464 | 5,5 |
| 2 | GM | Gawain Jones | ENG | 2548 | 5,5 |
| 5 | GM | Ralf Åkesson | SWE | 2484 | 5,0 |
| 5 | FM | Daniel Semcesen | SWE | 2402 | 5,0 |
| 7 | FM | Heini Olsen | FAI | 2376 | 4,0 |
| 7 | GM | Miroslaw Grabarcyk | POL | 2516 | 4,0 |
| 9 | | Martin Poulsen | FAI | 2281 | 2,5 |
| 10 | | Olaf Berg | FAI | 2227 | 1,5 |

## Fightarin Sulskis vann

Litavski meistarin frá 2007, og sum gjørdist nr. 2 í 2008, stórmeistarin GM Sarunas Sulskis, úr Litava, livdi fult og heilt upp til favorittrolluna í kappingini. Var í oddinum frá fyrsta til seinasta leik. Vann kappingina 1 stig fremri enn kappinarneytarnir.

Krútsterki Sulskis var sum unglingi partur av talvumhvørvinum í Sovjetsamveldinum, áðrenn múrurin fall og Litava gjørdist sjálvstøðug tjóð. Evnaríki telvarin úr Litava luttók í talvskúlanum hjá navnframa Botvinnik. Skúlin har bert tey allar bestu innan telvingina hava atgongd. Forkunnugt er tað, at ivaleyst besti telvari nakrantíð, Garry Kasparov, um somu tíð var partur í hesum umhvørvinum. Nevnast kann eisini, at Sulskis telvdi kvalifikatiónsdystir um HM-heitið í 1997, sum hann tó tapti ímóti Svidler. Bæði Kasparov og Svidler hava vitjað Føroyar í talvørindum.

Í talvi, er tá samanborið verður við annan ítrótt, møguleiki fyri at semjast um javnleikin. Tó eru ábendingar um, at hesin møguleikin er við at verða útilokar sum frálíður. Í útgangsstøðinum er Sulskis av teirri fatan, at javnleikurin skal prógvast, til ikki meira er í støðuni. Tí sat vinnarin, sum oftast til síðsta mann – í tímavís - og stríddist, at fáa sigurin til høldar hóast støðan til at síggja var jøvn. Fasinerandi fightari úr Litava.

## Semcesen úr Svøríki vann IM-normin

Umframt spenningin um plaseringar, var serligur spenningur um, hvørt tað mundi fara at hepnast føroyingum at vinna IM-normar í kappingini. Lokali, Heini Olsen, tørvar bert tann eina IM-normin, til tess at gerast Altjóða Meistari í Talvi.

Tað vísti seg tíðliga í kappingini, at talan gjørdist um ein orrustu ímillum Daniel Semcesen úr Svøríki og Heina Olsen, hvør av teimum, tá avtornaði, náddi málinum. Tað sýntist ikki, sum at báðir megnaðu at røkka málið. Tí var tað eitt satt "lagnu-talv" tá hesir báðir brustu saman í 7. umfarinum. Sviin dróg, við hvíta fólkinum, longra stráðið og vann talvið og tá kappingin varð lokin, var tað júst "hetta stigið", sum restaði í hjá Heina, meðan Semcesen júst rakk teim 5 stigunum og IM-norminum.

Talan er um fyrsta IM-normin hjá Semcesen, eftir í fleiri umførum at hava verið nær við, men har hann er snávaður. Í Klaksvík bar til !

## Føroyingar stóðu royndina

Martin Poulsen byrjaði kappingina sum eitt óløgi, við at vinna á pólska stórmeistaranum GM Miroslaw Grabarczyk, men síðani kom av álvara stígur í. Beint mótsatt gekst Olafi Berg, tí onki vildi líkasum bera til. Men í 7. og 8. umfari bragdaði av álvara, tá hann vann vakran sigur á svenska stórmeistaranum GM Ralf Åkesson og telvdi javnt í móti dananum IM Esben Lund. Gongdin kundi verið øðrvísi tí sum Sulskis tók til, at einasta talv har hann var í álvarsamum trupulleikum frá byrjan av, var ímóti Olafi Berg, hvørs talvstíli hóvaði honum sera væl.

Heini Olsen fekk eisini sera góða byrjan viðtveimumjavnleikum í móti stórmeistarunum Gawain Jones og Grabarczyk. Og hóast IM-vónin brast í 7. umfarinum, reistist Heini í sonnum fýrverki, við ivaleyst vakrasta talvinum í kappingini, tá hann sera sannførandi vann finska altjóða meistaran IM Tapani Sammalvuo, sum var í oddinum í kappingini.

Samanumtikið vístu føroyingarnir at teir væl kunnu telva upp ímóti teim sterkastu, íroknað stórmeistarum, um tað skal verða. Dygdirnar eru har.

Næsta høvi í royndini eftir IM-normum verður tá Talvolymiadan verður telvað í Dresden í Týsklandi um slakan mánað.

## Omanfyri 1000 áskoðarar dagliga

Tøknin nú á døgum ger tað møguligt at fylgja telvingini – leik fyri leik – umvegis alnetið. Dagliga vóru omanfyri 1000 áskoðarar og fylgdu telvingini á www.faroechess.com. Flestu "áskoðararnir" vóru úr Norðurlondum og Føroyum, men heili 62 lond vitjaðu Klaksvík meðan telvað varð.